# Síðsta útkall hjá Neistanum

**Hondbóltur Skulu Neistakvinnur gera sær nakra vón um FM-finalu í Sunset-kappingini, noyðast tær at vinna útidystin í Vági sunnudagin**

Hilmar Jan Hansen

Hóast seks umfør enn eru eftir í hondbóltskappingunum hjá kvinnum og monnum, gerast dystirnir alsamt meira avgerandi, sum tað líður út á kappingina. Um vikuskiftið verður eitt nú spældur ein av mest avgerandi dystunum hjá Neistakvinnunum, tá tær skulu til Vágs at spæla ímóti VB, ið ikki hevur tapt í síðstu fimm dystunum.

Neistin er fýra stig aftan fyri Stjørnuna og tvey stig aftan fyri Tjaldur, men er undir trýsti, tí liðið hevur tapt tvær ferðir fyri bæði Stjørnuni og Tjaldri, men bara vunnið eina ferð á hvørjum teirra. Hóast Neistin enn eigur á at møta Stjørnuni og Tjaldri eina ferð aftrat, styrkir tað ikki um støðuna, at Neistin er aftan fyri hini bæði – og í øllum førum skal fáa annað aftur fyri at koma í FM-finaluna.



VILJA LØNA AFTUR

*Lítið man vera at ivast í, at kollfirðingar vilja løna Neistanum fyri ósigurin í steypafinaluni herfyri, men KÍF skal eisini ansa eftir teimum, ið kunnu nærkast aftanfyri*

Mynd: Álvur Haraldsen

Hin dysturin í Sunset-kappingini um vikuskiftið verður í Havn, har Kyndil tekur ímóti Tjaldri, og hóast Kyndil kann arga betru liðini viðhvørt, er Tjaldur stórfavorittur.

### Øktur spenningur

KÍF, sum er fimm stig framman fyri VÍF og Kyndil í kappingini um FM-finalu ímóti Neistanum, hevur sunnudagin eina ta truplastu avbjóðinga, tá Neistin kemur á vitjan í Kollafirði. Sjálvandi vilja kollfirðingar løna Neistanum aftur fyri taptu steypafinaluna, men meira enn so stendur upp á spæl.

Samstundis sum KÍF hevur sítt at hugsa um, spælir VÍF ímóti næstniðasta liðnum, StÍF, og Kyndil er partur av grannauppgerð ímóti H71. Vinna VÍF og Kyndil sínar dystir, samstundis sum KÍF ikki vinnur sín, kann tað spenningurin aftur økjast í Atlantic Airways-kappingini, har kollfirðingar leingi hava sæð út til at verið á veg í FM-finaluna.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið:

**Eikligan, kvinnur**
04/03 19.00 ........... ÍF-Ternan
06/03 13.00 .......... KÍF-Dráttur
06/03 14.30 ......... Fleyr-Mjølnir

**Eikligan, menn**
06/03 16.30 ............. Fleyr-ÍF

**Sunset-kappingin**
06/03 14.30 ........ Kyndil-Tjaldur
06/03 15.00 .......... VB-Neistin

**Atlantic Airways-kappingin**
06/03 15.00 ............. VÍF-StÍF
06/03 16.00 .......... Kyndil-H71
06/03 16.00 .......... KÍF-Neistin

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 18 | 514 | 421 | 93 | 30 |
| 2 | Tjaldur | 18 | 513 | 426 | 87 | 28 |
| 3 | Neistin | 18 | 492 | 416 | 76 | 26 |
| 4 | VB | 18 | 455 | 441 | 14 | 20 |
| 5 | Kyndil | 18 | 417 | 434 | -17 | 14 |
| 6 | VÍF | 18 | 406 | 497 | -91 | 7 |
| 7 | StÍF | 18 | 351 | 513 | -162 | 1 |

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 18 | 638 | 490 | 148 | 35 |
| 2 | KÍF | 18 | 507 | 469 | 38 | 24 |
| 3 | VÍF | 18 | 501 | 464 | 37 | 19 |
| 4 | Kyndil | 18 | 467 | 465 | 2 | 19 |
| 5 | H71 | 18 | 489 | 486 | 3 | 16 |
| 6 | StÍF | 18 | 461 | 477 | -16 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 18 | 430 | 642 | -212 | 2 |

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 18 | 16 | 2 | 51 | 11 | 40 | 20 |
| 2 | Fleyr | 18 | 15 | 3 | 48 | 18 | 30 | 19 |
| 3 | SÍ | 19 | 14 | 5 | 46 | 24 | 22 | 17 |
| 4 | ÍF | 18 | 10 | 8 | 35 | 30 | 5 | 12 |
| 5 | TB | 19 | 8 | 11 | 31 | 41 | -10 | 9 |
| 6 | Ternan | 18 | 5 | 13 | 20 | 43 | -23 | 7 |
| 7 | Dráttur | 18 | 2 | 16 | 22 | 50 | -28 | 3 |
| 8 | KÍF | 18 | 3 | 15 | 14 | 50 | -36 | 3 |

### Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 18 | 16 | 2 | 50 | 15 | 35 | 22 |
| 2 | Mjølnir | 19 | 12 | 7 | 41 | 28 | 13 | 17 |
| 3 | SÍ | 18 | 10 | 8 | 40 | 27 | 13 | 12 |
| 4 | Fleyr | 17 | 7 | 10 | 25 | 36 | -11 | 9 |
| 5 | TB | 18 | 0 | 18 | 4 | 54 | -50 | 0 |

# Vinnarin tryggjar seg

**FLOGBÓLTUR Kvinnurnar hjá Fleyr ella Mjølni kunnu við sigri sunnudagin í dystinum teirra millum við fullari vissu tryggja sær sess í FM-finaluni**

Hilmar Jan Hansen

Nú kappingin í Eikliguni hjá kvinnum nærkast endanum, kann um vikuskiftið endaliga vera greitt, hvørji lið skulu spæla FM-finalu. Sunnudagin møtast Fleyr og Mjølnir í Gundadalshøllini, og har er tað heilt einfalt soleiðis, at vinnarin tryggjar sær pláss í FM-finaluni.

Undan dystinum hava Fleyr og Mjølnir ávikavist 19 og 20 stig, meðan SÍ á triðja plássi hevur 17 stig, men hevur spælt ein dyst meira. SÍ hevur bara teoretiskan møguleika at fáa taparan sunnudagin aftur, men tað krevur, at SÍ vinnur báðar sínar írestandi dystir og taparin tapir báðar.

Dystarskráin hjá teimum trimum liðunum víðari fram sær soleiðis út, at Mjølnir hevur heimadystir eftir ímóti KÍF og SÍ, Fleyr hevur heimadyst eftir ímóti Ternuni og útidyst ímóti TB, og SÍ hevur útidystir eftir ímóti Drátti og Mjølni.

Í kvøld spæla ÍF og Ternan annars á Kambsdali og sunnudagin tekur KÍF ímóti Drátti í Kollafirði. Hetta eru alt dystir millum lið, ið liggja lægri á stigatalvuni, so eingin av hesum dystur hevur týdning fyri kappingina í ovara endanum.

Bara ein dystur er í Eikliguni hjá monnum, og hann verður í Havn sunnudagin millum Fleyr og ÍF. Fleyr hevur útspælt sín leiklut sum topplið, meðan ÍF langt síðani er komið í FM-finaluna, so hetta er ein dystur, sum mestsum »bara« skal spælast.



VINNARIN Í FINALUNA

*Tá kvinnurnar hjá Fleyr og Mjølni spæla í Havn sunnudagin, kemur vinnarin við vissu í FM-finaluna, meðan taparin helst bara skal bíða eitt sindur eftir sínum finaluplássi*

Mynd: Álvur Haraldsen

hilmarjan@sosialurin.fo